5-mannafør, dreingir:

Spógvin fekk høvdið fyri seg

Sjálvur starturin var einki serligur hjá nýggja gula bátinum, men tá ið teir eftir startspurtin høvdu vunnið fremsta plássið, góvu teir tað ongantíð frá sær aftur, hóast tríggir bátar vóru framvið

KAPPRÓÐUR
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

Starturin hilnaðist ikki serliga væl hjá Spógvanum, men teir megnaðu at rógva seg fremst í feltinum

Mynd: Álvur Haraldsen

Tað kundi ikki laga seg betri hjá NSÍ dreingjunum. Teir komu á Norðoyastevnu í nýggjum báti, og størsti parturin av manningini var spildurnýggj. Men tað bilti ikki. Hóast Spógvin ikki fekk besta startin, so var tað skjótt, at teir høvdu togað seg fram á fremsta plássið. Tað slitnaði ikki sundur aftur til næstu bátarnar. Men Spógvin helt hinar aftanfyri seg.

– Vit startaðu ikki væl. Tí hildu vit honum uppi í bekkinum eitt sindur longri, enn hinir gjørdu tað. Tá ið eg sá, at vit høvdu lagt hinar afturum okkum, fóru vit niður á lunnin, og eg haldi, at vit vóru fremstir allan vegin.

Tað sigur Høgni Petersen. Hann er stýrimaður og bátsformaður umborð á Spógvanum. Rímuligt er hann væl nøgdur. Umframt hann sjálvan er tað bara ein annar av manningini, sum hevur róð áður. Hinir fimm eru spildurnýggir. Bátsformaðurin er átjan ára gamalur og aldursforseti. Yngsti maður umborð á Spógvanum er fimtan ára gamalur.

Høgni Petersen stýrir. Á lærinum sita Bárður Johannesen og Brian Jacobsen. Í rúminum eru Búgvi Kjeld og William Højgaard, og á toftini eru tað Per Vennød, sum eisini róði í fjør, og Hans Jákup Johansen.

Í fjør vóru teir báðir, Høgni og Per, umborð á Tjaldrinum, sum endaði á triðja plássinum í FM kappingini. Nú ætla teir sær at vera við í FM kappingini, og á Norðoyastevnu hilnaðist tað so mikið væl, at teir hava alla orsøk at rokna við møguleikanum.

Avbjóðararnir

Næstu kappingarneytarnir hjá Spógvanum vóru Blikur, Fípan Fagra og Havfrúgvin. Teir fylgdu allir væl við, og onkra løtuna tóktist tað sum um, at teir høvdu hug at bjóða Spógvanum av.

Ta einu løtuna hevði Blikur av Argjum hug at ota seg upp undir liðina á Spógvanum, men teir á gula bátinum svaraðu dyggiliga aftur.

Hjá Havfrúnni verður setningurin á Skálafjørðinum at gera tað gott aftur, sum miseydnaðist í Klaksvík, eftir at tað í eina løtu hevði sæð rættuliga spennandi út. Dómarin kendi seg noyddan at skjóta róðurin av eftir fyrra startin. Tá hevði Havfrúgvin fingið góðan start, men hon og Sílið fløktust. Tað hevði gult kort við sær til báðar bátarnar, og í seinna førinum endaði tað soleiðis, at hesir báðir bátarnir komu upp á stigatalvuna við ávikavíst trimum og tveimum stigum.

Firvaldur av Tvøroyri hevði hug at hanga uppi í fremra endanum í eina løtu, men teir høvdu ikki nóg nógva orku, tá ið tað ráddi mest um. Tískil endaðu teir aftanfyri Teklu úr Klaksvík, sum varð nummar seks. Harvið fingu báðir bátarnir hjá Klaksvíkar Róðrarfelag stig í dreingjakappingini.

Fimmmannafør, dreingir

1	Spógvin	5:24:24
2	Blikur	5:26:12
3	Fípan Fagra	5:27:12
4	Havfrúgvin	5:29:24
5	Sílið	5:34:23
6	Tekla	5:35:19
7	Firvaldur	5:36:10
8	Royndin Fríða	5:39:14
9	Báran	5:43:18
10	Tjaldrið	5:44:01
11	Kollur	5:46:12
12	Svanur	5:47:04
13	Drekin	5:48:08

8-mannafør:

Argjabáturin aftur á beint

Eftir at teir ongan róður vunnu í fjør og ikki hava verið meistarar síðani í 2000, tykist tað nú sum um, at Argjabáturin rættuliga er um at koma fyri seg aftur

KAPPRÓÐUR
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

Fýra nýggir mans eru umborð á Argjabátinum, men hetta tóktist slettis ikki bilað. Teir vóru góða bátslongd undan næsta bátinum

Mynd: Álvur Haraldsen

Flaggskipið hjá Argja Róðrarfelag er Argjabáturin. Tað er eingin ivi um tað. Í níti árnum vann Argjabáturin glæsiligar sigrar. Frá 1991 og fram til og við 2000 vóru teir sjey ferðir meistarar. Síðani hevur tað verið soltnari. Í fjør var Ørvur hjá Havnar Róðrarfelag einaráðandi, meðan Argjabáturin kappaðist við Kvívíking um næstfremsta plássið.

Men nú tykist tað vera møguleiki fyri, at Argjabáturin rættuliga skal koma fyri seg aftur.

– Kappingarárið er langt, og tað kann so mangt henda, áðrenn ólavsøkuróðurin er av. Ofta er tað tepurt. Tað sóu vit í 2002. Tá kappaðust vit við Kvívíking um FM heitið. Vit vunnu á Norðoyasetnvu og Ólavsøku. Teir gjørdust meistarar, og vit minnast aftur á, at vit taptu FM heitið við einum tveimum sentimetrum, tá ið vit kappaðust í Hósvík.

Høgni Jacobsen minnist aftur á, hvussu tað hevur gingið undanfarnu árini. Hann er bátsformaður umborð á Argjabátinum, sum hann hevur verið við til at manna síðani í 2002. Í 2001 róði hann við Nevinum Reyða í Klaskvík, sum var spildurnýtt og vann FM heitið fyri higartil einastu ferð.

– Tað kennist hugaligt hjá okkum, nú vit vunnu fyrsta róðurin. Men kappingin var stór, og tað er heilt greitt, at eingin fer at koma sovandi til nakað FM heiti. Men vit fara at gera okkara besta.

Argjabáturin lá vestastur í Klaksvík. Tað var eitt sindur torført hjá teimum at fylgja við í, hvussu tað gekk inneftir, tí hinir lógu allir væl eystari á. Nevið Reyða, sum teir leingi kappaðust við, var eystastur av øllum.

– Kvívíkingur var frammanfyri okkum, inntil tað restaðu einir fýra hundrað metrar. Vit høvdu eina hóming av, at tað var rættuliga tætt millum okkum og Nevið Reyða. Men vit vóru ikki greiðir yvir, um vit vóru frammanfyri teir, ella hvussu nógv vit vóru frammanfyri. Eg haldi, at vit kunnu siga, at vit vunnu upp á ein góðan endaspurt, sigur Høgni Jacobsen.

Á málinum var Argjabáturin eina bátslongd frammanfyri Nevið Reyða, og Nevið var eina stóra hálva bátslongd frammanfyri Kvívíkingin.

Kann gerast betri

Hvat roknar tú við í næstu kappingunum?

– At tað verður spennandi og tætt. Eg haldi ikki, at vit róðu so væl, sum eg haldi, at vit eiga at megna. Men eg rokni eisini við, at hinir bátarnir fara at verða betri fyri, enn teir voru hesa ferð. Eg veit, at teir umborð á Kvívíkingi ikki fóru í bátin fyrrenn Flaggdagin, og at teir ikki høvdu vant nakað serligt, áðrenn teir fóru í bátin. Vit hava vant nógv longri enn so. Tí rokni eg bara við, at teir fara at verða betri førir fyri at kappast við okkum, enn teir vóru á Norðoyastevnu, sigur Høgni Jacobsen, sum eisini sigur seg rokna við, at Ørvur, ið hevur nýggja manning, man fara at koma fyri seg.

Umborð á Argjabátinum eru fýra nýggir, tá ið sammett verður við í fjør, og í ár sita bara tveir á sama plássi, sum teir gjørdu í fjør. Nýggju menninir eru kortini ikki púra nýggir í kappróðri. Merkisvert er tað eisini, at fleiri av teimum, sum luttóku á Oyggjaleikunum í fjør, nú eru við til at manna Argjabátin.

Manningin er henda: Uni Gullfoss, Høgni Midjord, Høgni Jacobsen, Jóhan Mouritsen, Gudmundur Joensen, Eyvind Akraberg Hansen, Gutti Harryson, Jóhannes Olsen og Ken Zachariassen.

Áttamannafør

1	Argjabáturin	7:44:11
2	Nevið Reyða	7:47:16
3	Kvívíkingur	7:49:02
4	Ørvur	7:52:00
5	Knørrur	7:55:02

Leingi var líkt til, at Páll Fangi skuldi vinna á heimasjógvi, men tað eydnaðist Jarnbardi at ota seg framum

Mynd: Álvur Haraldsen

6-mannafør, kvinnur:

Jarnbardur hevur sett kósina

Hóast tær leingi vóru á triðja og fjórða plássinum, so megnaði roynda kvinnumanningin á Jarnbardi at enda at seta alt upp á pláss

KAPPRÓÐUR
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

Tað hevur so ofta áður tørnað soleiðis út. Tí var tað ikki óvæntað. Sum so mangan áður skuldu tær stríðast fyri sigrinum, og sum so ofta, so eydnaðist tað teimum, hóast starturin ikki hevði verið so sannførandi.

– Vit fingu ikki góðan start. Men vit duttu ongantíð afturav. Eg sá fram á Lóm og Páll Fanga, sum vóru kanska eina bátslongd frammanfyri okkum. Vit kappaðust eina løtu við Gongurólv. Tær megnaðu ikki at halda tørn. So snúði tað seg um at fáa fatur á Páll Fanga og Lómi. Lómur megnaði ikki at halda Páll Fanga. Eg helt meg síggja, at hóast vit vóru eitt sindur aftanfyri Páll Fanga, so gekk tað støðugt um enn spakuliga tann vegin, at vit fingu betri og betri tak á honum, og tá ið tað restaðu einir 300 metrar, fóru vit fyrstu ferð framum og løgdu okkum á fremsta plássið, sum vit tíbetur megnaðu at varðveita. Men tær góvu ikki bara skarvin yvir. Tær royndu at svara aftur, so vit vóru sanniliga noyddar at stríðast fyri sigrinum.

Tað er róðurskvinnan umborð á Jarnbardi, Jannie Dam Jacobsen, sum greiðir frá, hvussu hon upplivdi kappróðurin í Klaksvík leygardagin. Hon hevur verið við í nógv ár, og hon hevur verið við til at vinna nógvar sigrar og fleiri FM heiti. Í fjør var Jarnbardur ikki meistari. Fleiri av rógvarunum vóru burturstaddar. Við skiftandi manningum luttóku tær í fleiri kappingum, og á Ólavsøku bar tað teimum til at vera mannaðar soleiðis, sum tær helst vildu vera tað.

Í ár hava tær vant væl og leingi. Tær flestu umborð á Jarnbardi luttóku í Scilly kappingini fyri nøkrum vikum síðani.

Jarnbardur var seinast FM vinnari í 2002. Av tí manningini eru fimm við aftur í ár. Jannie Dam Jacobsen stýrir, og so eru hinar Petra Hansen, Súsanna Skylv Sørensen, Eivy Olsen, Kristianna Dahl Øster, Rannvá Jacobsen og Kerstin Rasmussen.

Fleiri fara at bjóða seg til

Umborð á Páll Fanga er nett sama manningin, sum eisini róði við í fjør. Tær vunnu á bygdastevnuni á Skála, og tað var ikki frítt, at tað í Klaksvík varð vónað og kanska eisini roknað við, at tað skuldi eydnast Páll Fanga at verja áhugamálini hjá vertsfelagnum. Leingi sá tað væl út, og tá ið bátarnir vóru komnir á mál tóktist tað sum um, at onkrar av manningini á Páll Fanga høvdu fingið eitt prej um, at tær høvdu vunnið. Tí er einki at siga til tað, um tær vóru rættuliga vónbrotnar. Men avrikið bendi á, at Páll Fangi eisini tær næstu ferðirnar fer at vera millum bátarnar, sum fara at bjóða Jarnbardi av.

Úttan iva fara Lómur og Víkingur, sum endaði á fjórða plássinum, eisini at vera við í kappingini.

Eitt sindur óvæntað var tað, at Gongurólvur hesa ferð ikki megnaði meiri enn fimta plássið. Gongurólvur var FM vinnari í fjør. Nú var talan um spildurnýggjan Gongurólv. Sum vit hava skilt tað, so vóru fleiri av teimum, sum í fjør vunnu FM, við nýggja bátinum hesa ferð. Men í fyrstu royndini hilnaðist tað ikki akkurát soleiðis, sum tað kanska kundi havt verið roknað við. Men leikirnir eru mangir í longum talvi, og longu leygardagin verður nýggjur møguleiki hjá Páll Fanga, Lómi, Víkingi, Gongurólvi og hinum, sum droyma um at gera nakað við Jarnbard. Royndu róðrarkvinnurnar í Knørrafelagnum settu leygardagin á vánni í Klaksvík kós ímóti enn einum FM heiti.

Seksmannafør, kvinnur

1	Jarnbardur	5:34:20
2	Páll Fangi	5:36:01
3	Lómur	5:42:19
4	Víkingur	5:44:12
5	Gongurólvur	5:45:23
6	Sølmundur	5:55:14
7	Sundabáturin	6:04:13

Íslendska Landsbankadeildin

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Fylkir	5	3	-	2	-	0	7	2	5	11
2 Keflavík	5	3	-	1	-	1	7	5	2	10
3 ÍA	4	2	-	2	-	0	6	5	1	8
4 FH	5	2	-	2	-	1	5	4	1	8
5 ÍBV	5	1	-	3	-	1	6	6	0	6
6 Grindavík	5	1	-	3	-	1	5	6	-1	6
7 Fram	5	1	-	2	-	2	7	7	0	5
8 KR	4	1	-	1	-	2	5	7	-2	4
9 KA	5	1	-	1	-	3	4	6	-2	4
10 Víkingur R	5	0	-	1	-	4	2	8	-6	1

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (ÍA), Fróði Benjaminsen og Hans Fróði Hansen (Fram)

Javnleikur hjá Fram

Íslendska Fram við Hans Fróða Hansen og Fróða Benjaminsen leikti mánakvøldið javnt móti oddaliðnum, Fylkir, tá teir leiktu sín fimta dyst hetta kappingarárið.

Fram var á odda í steðginum, eftir at mótstøðumaður hevði gjørt sjálvmál, men í seinna hálvleiki eydnaðist Fylkir at javna.

Eftir javnleikin er Fram á sjeynda plássinum í deildini. ÍA við Julian Johnsson á liðnum er á triðja plássinum, men teir hava leikt ein dyst færri enn oddaliðið.

-jm

Grønkjær ikki í Portugal

Ein av týdningarmestu spælarunum á danska fótbóltslandsliðnum, Jesper Grønkjær úr Chelsea, er ikki farin við danska landsliðnum til Portugal. Mánadagin fóru danirnir avstað til EM, men Grønkjær varð verandi heima í Danmark. Orsøkin var álvarsom sjúka í familjuni, og tað er ikki greitt, um Grønkjær yvirhøvur verður við til EM.

– Tað er sumt í lívinum, sum hevur størri týdning enn fótbóltur, og tað er ikki minst familjan. Eg havi tosað við Grønkjær, og eg skilji væl, at hann vil verða heima fyri fyrstu, sigur danski landsliðsvenjarin, Morten Olsen.

Enn er ikki greitt, nær ella um Jepser Grønkjær kemur til Portugal, men landsliðsvenjarin ætlar at hava eitt pláss í hópinum tøkt til Grønkjær, og kemur hann ikki, so hevur Danmark bara 22 spælarar at velja ímillum.

EM í Portugal byrjar leygardagin.

-ek

McCartney órógvar Byrial

Bretski tónleikarin Sir Paul McCartney fer at órógva fyrireikingarnar hjá føroyska landsliðsspælaranum Johan Byrial Hansen og hansara liðfeløgum í AC Horsens undan dystinum ímóti B913 um vikuskiftið.

Orsøkin er, at Paul McCartney spælir tvær konsertir í Horsens í vikuni, og nógva virksemið rundan um konsertinar ger, at AC Horsens ikki kann nýta sínar vanligu venjingarvøllir. Tí mugu teir venja og fyrireika seg aðrastaðni til tveir teir avgerandi dystirnar um uppflytingina til superliguna.

-ek

Dómarin misti vitið

Ein dómari í lægru deildunum í Noregi fekk av at vita frá einum spælara um vikuskiftið. Tað var í einum dysti í Rogalandi, at ein spælari gjørdist sera illur um eitt brotsspark, sum varð dømt ímóti honum. Hann skeldaði og koyrdi undir dómaran, og tað vildi dómarin ikki finna seg í og gav honum reyða kortið. Tá smekkaði spælarin til dómaran og rakti hann í bringuna. Dómarin misti vitið av slagnum í einar tveir minuttir, men kom fyri seg aftur og dømdi dystin lidnan. Hann hevur ikki gjørt meira við málið, men spælarin varð burturvístur av leikvøllinum, skrivar Verdens Gang.

-ek

Profilar av vøllinum

Allan Nielsen, sum í løtuni er spælandi venjari í Herfølge, fer neyvan at spæla aftur eftir summarsteðgin. Felagið hjá honum vil ikki váttað hetta, men sigur, at samráðingar eru um, at Allan Nielsen skal brúka alla sína orku til at vera venjari. 33 ára gamli Allan Nielsen spældi 44 landsdystir fyri Danmark.

Ein annar profilur í donskum fótbólti seinastu mongu árini, Stig Tøfting, sum nú spælir fyri AGF, hevur møguliga fingið ein álvarasaman skaða í knæið. Hann bíðar nú eftir endaligum boðum um, hvør krossbandið er skatt, og er tað dómurin hjá læknunum, kann hann ikki spæla aftur í ár.

-ek